# Samtykt at fara undir endaligu projekteringina

**Á fundi í Nes kommunu mánakvøldið samtykti bygdaráðið einmælt at fara undir endaligu projekteringina av útbygginini av Tofta skúla og at bjóða arbeiðið út**


SKÚLABYGGING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*




*Súni í Hjøllum*

Súni í Hjøllum, formaður í teknisku nevnd hjá Nes kommunu, sigur, at Arkitektafelagið hjá Albert Isfeldt væntandi fer at bjóða arbeiðið alment út í august.

Samlaða byggingin er mett at kosta nakað oman fyri 40 miljónir krónur, sigur hann.

Súni vísir á, at tá ið tilboðini, sum vónandi verða lægri enn metingin, eru komin, verður endalig støða tikin til málið, eitt nú til fíggingina av verkætlanini - og um øll verkætlanin verður framd í einum ella møguliga tveimum byggistigum.

- Málið er, at meginparturin av arbeiðnum verður liðugt á sumri í 2007.

Hann sigur, at Nes kommuna í fleiri ár hevur sett pening av til hesa skúlabygging, sum hann metir vera alneyðuga til tess at lúka krøvini í skúlalógini – og eisini við atliti til menningina, sum annars hevur verið í kommununi.

- Hetta er eitt stórt, men neyðugt tiltak hjá kommununi, og væntandi verður neyðugt at taka eitt lán, sum er millum 18 og 22 miljónir krónur.

Súni sigur, at hann sum bygdaráðslimur í Nes kommunu í fleiri ár hevur hann verið við til at fyrireikað fleiri útbyggingar av Tofta skúla.

- Men hesar ætlanir eru altíð farnar fyri bakka av ymsum orsøkum; tí fegnist eg av sonnum um, at útbyggingin nú verður veruleiki – og við hesi útbygging verður Tofta skúli millum teir fremstu í landinum.

Formaðurin í teknisku nevnd vísir á, at við stóru íløguni til skúlabygging fer kommunan við verandi inntøkum, sum liggja um 27 miljónir krónur um árið, kortini at hava pláss til aðrar íløgur.

- Her hugsi eg serliga um ídnaðarøkið millum Oyrarnar og Rætt, sum í løtuni er til viðgerðar í teknisku nevnd, sigur Súni í Hjøllum, sum eisini er varaborgarstjóri í Nes kommunu.



*Her eru tey bæði avmyndað á Bátasavninum í Leirvík, Ólavur Jakobsen (guitar) og Monika Stauss Joensen (violin)*

Mynd: Vilmund Jacobsen

# Monika og Ólavur konsertferð í USA

**Konsertferðin hjá Moniku Stauss Joensen og Ólavi Jakobsen til USA byrjaði í Leirvíkar kirkju**


KONSERTFERÐ
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*


Tey bæði, Monika Stauss Joensen, sum spælir violin og Ólavur Jakobsen, sum spælir guitar, fara til USA á konsertferð, 15. mai, haðani tey koma aftur, 26. mai.

Monika og Ólavur eru boðin at hava einar seks konsertir á Los Angelesleiðini.

### Kent navn

Tað er Fréderic Balazs, sum er forseti í MAY (Music and Art for Yout), ið skipar fyri konsertunum hjá teimum báðum.

Balazs er sjálvur violinleikari, komponistur og var í fleiri ár dirigentur hjá New Oklahoma Texas Symphonie-orkestrinum.

Hann var eisini dirigentur hjá Frank Sinatra í fleiri ár og vitjaði annars í Føroyum í sambandi við summartónar á sumri 1998.

### Væleydnað

Konsertferðin hjá Moniku Stauss Joensen og Ólavi Jakobsen byrjaði við væleydnaðari konsert í Leirvíkar kirkju týskvøldið.

# Nøgd við festivalin

**Seinasta leygardag skipaði Bátafelagið á Toftum saman við stuðulsnevndini hjá B68 fyri bátafestivali á Toftum**


FESTIVALUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*


Um 14.30-tíðina seinasta leygardag stevndu útvið 30 bátar við nýggja trolbátinum, Hansu Mariu, á odda móti Oyrunum á Toftum, meðan Nes sóknar hornorkestur spældi.

Tá ið bátarnir høvdu lagt til bryggju, fingu manningarnar súpan og annað, sum borðreitt varð við í matstovuni á virkinum hjá Føroya Fiskavirking.

Ymiskt var á skránni til henda fyrsta bátafestivalin, sum hevur verið á Toftum, eitt nú hoppiborg, el-bilar, boogy og go-cart, bamsutombola, pylsusøla, breydsøla, søluframsýning, málningaframsýning, uppboðssøla av málningum, fótbóltur, felagssangur og dansur.

Í tjaldinum spældu ungar lokalar kreftir fyri teimum ungu, sum hugnaðu sær óført og í hølunum hjá Fiskamarknaði Føroya spældi country orkestur úr Havn.

Eftir at bátarnir høvdu lagt til bryggju varð eisini skipað fyri bjargingarroynd út fyri bygdini, har Brimil og tyrlan hjá Atlantsflogi luttóku.

Veðrið til bátafestivalin eydnaðist ikki so væl, sum ynskiligt var. Hann var høgur í ættini við frískum loti, og tað ælaði inn ímillum.

Høgni W. Høgnesen, sum var ein av stigtakarunum til Bátafelagið á Toftum – og sum hevur verið "primusmotorur" aftanfyri festivalin, sigur, at tey eru væl nøgd við hetta fyrsta tiltakið av sínum slagi á Toftum.

- Hóast veðrið ikki royndist av tí besta, var væl av fólki á stevnuøkinum – og um náttina var góður dansur, har bæði ung og tilkomin hugnaðu sær, sigur Høgni W. Høgnesen.





*Eftir at bátarnir høvdu lagt til nýggju bryggjuna í Oyrunum, varð skipað fyri bjargingarroynd*

Myndir: Vilmund Jacobsen